MÁLTEIGURIN

Hjartaskerandi

Orðið 'skera' (fyri 'operera') hevur verið umtalað í Málteiginum. Summi siga, at fólk, sum skulu opererast, verða »løgd undir skurð«. Um ein kendan politikara verður sagt, at hann skal »skurðviðgerast fyri hjartað«. Onkur annar heldur, at vit eiga at kunna siga 'operera' um tað, sum læknar gera, tí 'skurður' kann vera so mangt, og tann, sum opererar, hann ger so mangt annað enn bara at skera.


Tað ræður um at vaksa um »málsins korpus« verður sagt í einari skilagóðari grein í Dimmalætting tann 11. oktober. Tað er púra rætt. Málkroppurin skal vera so stórur, sterkur og fimur og kimiligur, at hann kann fevna um øll viðurskiftir og allar sakir og øll fak og vísindaøkir. Málkroppurin skal hava armar og bein og hendur og fingrar og annað útstandandi og ikki minst: høvd. Ein berur, snøggur og snøggaður norrønur bulur kann ikki brúkast til nógv annað enn at hyggja at og undrast á.

Hví skal fakorðið 'operera' skerast burtur úr málinum? Hetta er harðhjartað og lítið umhugsað. Vit hava annars nógv orð av sama slag: læknar praktisera, lærarar feriera, vit panera fiskafløk, vit planera byggigrundir, vit sanera fiskivinnuna, vit massera gikt, vit brodera vest, og viðhvørt er so illa statt, at vit noyðast at amputera bein – ella skal tað eita at *saga*?

Tá ið ein frisørur skal eita 'hárskeri', so má ein hjartakirurgur eita ein hjartaskeri. Men nýraspesialisturin er eingin skeri, tá ið hann »leggur undir skurð« fyri nýrastein. Hann brúkar grótknúsara.

Mitt inni í kroppinum er hjartað. Tað syrgir fyri, at lív er í hvørjari tægr. Málamputeringin er so skaðilig, at tað setir at hjartanum. Og teir, sum skera og saga burtur av málinum, eru strangir harrar, illbrýntir og gravalvorligir og so lítið sjarmerandi, at ikki ber til at siga, at teir eru hjartaknúsarar.

C



© tgs, 1996

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Bogi Erlingsson
Rasmussargøta 7
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: GORFUGLURIN

	P	E	N	I	N	G	A	S	T	O	V	N	U	R		S
F	I	S	K	I	G	R	U	N	N	U	R		S	U	N	I
	L		T		O	A	S	A		T	Á	M		S	E	
	K	M		C		S		R	E			O	S	T	U	R
	Á		F	A	R	A	O		A		A			A		Ó
86	F	Ø	T		G	A			T	N		M				L
	F	Ø	R	O	Y	A	S	P	A	R	I	K	A	S	S	I
	I	R	A		A	R	A	L		O	R	A	N		E	G
	D	O	R	A		Ð		I	N	N		R	A	N	G	A
	E	Y		B	A	U	D		Ó	G	E	R	Ð		L	
	L	A	B	B	A	R		P	A	U		A	I	R		J
		B	I				O	R		R	A				T	U
	M	A	O		U	G	G	A	R		L	A		H	E	L
		N		F	R	E	N	S	A	G	E	L	D	A	R	I
	O	K	A			V	I	A		I	N	D	I	A	N	A
	E	I	N	A	H	A	N	D	I	L		A	N	G	A	N

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

87

Loysunarorðið:

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR

Tiltøk

Felagið Tórshavn: LIMAFUNDUR

23. oktober verður limafundur í útvarpinum. Byrjað verður við rundvísan, og síðani verður eftirmeting og tilrættisleggjan. Tilmeldan.

Losjan í Havn

Losjufundur verður mánakvøldið 21. okt. kl. 20.00.

AA-fundir

Leygardagin kl. 17 og 22.30
Sunnudagin kl. 11 og kl. 17. – Kl. 20–21.30 AA-evnisfundur í Tórsgøtu 5.
Mánakvøldið kl. 20 í Tórsgøtu 5.

Barnabati

Veitst tú, at
– Barna- og Ungdómstelefonin svarar hvønn mánadag frá kl. 16 til 18?
Tlf. nr. er 10645.
Foreldur kunnu eisini ringja og fáa ráðgeving.
Tey, ið svara, hava tagnarskyldu.
Tú kanst vera anonymur.
Hvat kanst tú ringja um?
– Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia ella bulimi, alkohol, fyribyrging, royking o.m.a., ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.
Barnabati

Felagið Føroyar-Kuba

Opið er soleiðis í Kongagøtu 11, Tórshavn: Mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 10–12, mikudag kl. 16–18 og leygardag kl. 15–17. Telefon 13016 - Fax 13824.

Javni

Skrivstovan er opin:
Mánadag: 10–12
Týsdag: Stongt
Mikudag: 14–16
Hósdag: 14–18
Fríggjadag: 14–16
Tilhaldið er opið fyrsta fríggjadag í hvørjum mánað kl. 14.30–16.30.

Læknavaktir

Tórshavn:
Sølvi W. Olsen,
tlf. 16611, *leygardagin*
Annika Olsen,
tlf. 17700, *sunnudagin*

Eysturoy:
Kári Rasmussen,
tlf. 47010, *leygardagin*
Hálvdan Simonsen,
tlf. 41490, *sunnudagin*

Norðuroyggjar:
Sigrid Nónsgjógv,
tlf. 56400

Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 14544.